# teimum foreldraleysu



*Hetta barnaheimið liggur eystanfyri Moskva*



*Jógvan Skýlindal og Marner Magnussen úr Føroyum saman við ungum russarum*



*Heimleys smágenta sum ein eldri genta heldur tvørtur um*



*Nakrir ungdómar í íbúðini hjá okkum, norðan fyri Moskva*



peningaliga før fyri at møta teimum likamligu krøvunum børnini hava. Og tað er ikki at gera av, tá eg sigi, at teimum tørvar alt. Vanliga eiga tey ikki so mikið sum eini undirklæðir at fara í innanundir.

Uttandura tiltøk, sum til dømis at fara saman at hyggja eftir einum fótbóltsdysti, ella gera eina útferð ella at skemta sær saman, hava tey ongan møguleika til. Tey hava ongar av hesum møguleikunum nú. Lívið er grátt og keðiligt.

Ætlan okkara er at víðka um arbeiði okkara, so vit kunnu røkka inn í fleiri barnaheim, at fylgja børnunum upp, fáa tey inn í samkomur, sum serliga skulu stovnast fyri teirra skuld. Samkomur sum ikki bara eru møtir og talur, men veruliga røkka alt likamið og hjálpa so fjølbroytt og væl sum nú einaferð ber til.

Akkurát hetta arbeiðið er tað týdningarmesta av øllum. Tí um hjálpin ikki røkkur longur enn til tey smæstu, missa vit tey tá tey eru komin upp í í tannárini. Og so veit eingin, hvat ið verður av teimum, tá tey einsamøll fara út í lívið. Øll lutvís hjálp er sjálvandi av størsta virði fyri Gudi og menniskjum, men skulu vit síggja arbeiðið vaksa í støðd og ikki bara í vídd, mugu vit fylgja teimum ungu upp. Í dag eru tað longu nøkur ung, fyrst í tjugunum, sum trúfast eru við í arbeiðinum í tí eina barnaheiminum fyri at hjálpa teimum yngru, teimum frá 6 ára aldri og uppeftir.

Men er hetta ikki eisini akkurát tað, sum Bíblian sigur vit skulu gera? Vit skulu ikki bara prædika fyri teimum, men gera tað, sum hevur nógv størri pláss í Bíbliuni – fylgja teimum upp, líka til tey eru før fyri at standa á egnum beinum. Líka til tey eru før fyri at veita øðrum sína hjálp. Men tað er ikki so lætt sum bara at prædika, tí ein prædika krevur ikki tað stóra ofrið, men at fylgja einum menniskja allan vegin upp gjøgnum lívið - at elska tað - tað krevur alt! Tí tað krevur at vit geva teimum okkara evnir, okkara huga, okkara tankar, okkara ognir, okkara tíð, okkara orku, ...vit mugu ofra okkum fyri tey. Men har liggur eisini allur ávøksturin goymdur.

Vit eru Gudi ómetaliga takksom fyri at Hann letur okkum síggja so stóran ávøkstur av arbeiðinum.

Hesin akurin er ómetaliga stórur, men møguleikarnir eru eisini ómetaliga stórir og nógvar dyr standa beint nú opnar fyri hesum arbeiði, bæði í Moskva og eysturi í Sibiriu.

Og av tí at hetta er ein andalig tænasta millum foreldraleys børn í Russlandi, kunnu vit í Jesu navni boða einum nýggjum ættarliði av russiskum børnum vón. Tí brúka vit eisini navnið "Generation of hope" uttanfyri Føroyar.

## FAKTA

**Hvussu tú kanst stuðla fíggjarliga**

Tá talan er um at stuðla einum andaligum arbeiði, verður mangan spurt: "Hvat er ein hóskandi upphædd at stuðla við?" Til handan spurningin er at siga: "Stuðla við upphæddini sum Gud leggur tær á hjarta!"

Í løtuni flytir Umsorgan 19.000 krónur yvir til Russlands um mánaðin. Og av tí at pengarnir eru umleið fýra ferðir so nógv verdir har, kunnu vit keypa líka nógva vøru fyri 19.000 har, sum vit høvdu fingið fyri 76.000 krónur her. So líka mikið hvørja upphædd tú setur tær fyri at stuðla við, skalt tú vita, at teir eru fýra ferðir so nógv verdir, tá teir koma fram.

Allur fíggjarligur stuðul til arbeiðið, skal flytast inn á hesa kontuna:

Suðuroyar Sparikassi: ..... 9870 - 102.156.8

Innkomin peningur verður hvønn mánaða fluttur beinleiðis til arbeiðið millum heimleys børn í Russlandi. Av tí at vit arbeiða sjálvstøðugt, og ikki eru bundin at nøkrum felagskapi, og av tí at vit gjalda fyri allar útreiðslur sjálvi, kunnu vit gleðast um, at einki verður nortið við tær einstøku gávurnar, men at allur innkomni peningurin kemur 100% til arbeiðið millum tey 720 børnini vit arbeiða fyri.

Vitja heimasíðuna www.umsorgan.org – Har eru fleiri upplýsingar og myndir frá arbeiðinum.